# Miðvikan

Kristian Djurhuus:

# Tað var skomm at hava lán í húsunum

**Í hesum partinum greiðir Kristian Djurhuus frá grannalagnum. Her er enn ein váttan um, at Lavamenn duga væl at húsast. Aðrir grannar vóru tey hjá Jens Mohr, har synirnir kundu vera nakað buldrasligur**

**7. partur**

Tá ið eg fór eftir torvi kom eg ofta í fylgi við tann gamla bókbindaran H. N. Jacobsen, sum var ein sera íðin traðarmaður. Hann var tá ein gamal maður. Hann plagdi at fara við tøðum í leypinum út á trøðna og hevði so hoyggj við sær heim aftur.

Tá ið tað var mótvindur, kundi vera trupult hjá honum at vinna framá, tað kundi eisini ganga eftir hæli hjá honum. Tá plagdi eg at taka byrðina av honum. Hetta var hann so takksamur fyri, at tá ið eg giftist, gav hann mær eina lestrabók í gávu.

Omma í Ólastovu hevði havt eina arbeiðsgentu úr Hovi "Suðuroyar Johanna". Hon hevði sína egnu uppfatan av barnamati. Hann skuldi vera sterkur sum til dømis skerpikjøt. Hon tók einaferð suttuna frá Johan beiggja mínum, og gav honum ein knæskel av skerpikjøti at súgva í staðin, so hann kundi blíva sterkur.

Johanna var sera góð við okkum. Eg minnist, hvussu fegin vit vóru um at fáa breyð við margarin og putursukur frá henni.



*Stutt var millum húsini. So smalt millum húsini er framvegis omanfyri húsini á Lava. Fyri endan á gøtuni eru húsini á Mýruni. Her búði Katrina, vanliga kallað Kilarin. Hon hevði vanliga slíkan skund, at tað varð sagt, at hon "kilaði" avstað. Tí varð gøtan kallað Kilarkanalin*

### Húsaskuldin píndi

Hon og maðurin Óli Tauser, systirsonur Jákup á Lava, vóru ognarleys burtursæð frá húsunum, har tað var eitt lítið lán í sparikassanum. Henda skuld píndi tey, tað var ein skomm at skylda í egnum húsi!

Afturat hesum kom at húsið mátti tryggjast, og tað kostaði eisini. Hetta kom teimum til góðar, tá ið eldur eina ferð var í húsinum. Men sum vanligt var tá í tíðini, var tryggingarupphæddin minkað í sama mun sum skuldin í húsinum, tí varð endurgjaldið avmarkað.

Óli og Johanna fingu frá Húsagarðsbóndanum loyvi til at hava eitt gásapar. Her vóru tey heppin. Tey fingu sum oftast 12 ungar undan hvørt ár. Tá teir komu heim úr haganum, var nógvur matur, og vit brøður vórðu tá bodnir at fáa krásasúpan, sum vit ikki fingu í Ólastovu. Hetta smakkaði sera væl. Gásakrovini vórðu hongd upp at turka. Hetta var vælsmakkandi og heilsugóður viðskeri.

Men Óli og Johanna vóru nøgdsom, og tað var ikki gerandiskostur við turkaðum gásakjøti. Hetta skuldi bert etast til høgtíðir, og tá ið tað komu gestir.

### Konan unti ikki manninum sjúkraviðgerð

Vit kendu eisini eina aðra Johannu, sum var úr Leirvík, og sum eisini var trúføst móti okkum í Ólastovu. Hon var gift við Óla, son Jákup á Lava. Ein sonur teirra Jákup kom ungur út at sigla. Hann var ein flottur fýrur, og undir 1. veraldarbardaga kom hann í amerikanska krígstænastu. Men hansara upplivilsir gjørdu hann sálarliga sjúkan í fleiri ár. Tað var ikki fyrr enn hann fekk sjokkviðgerðir, at hann kom fyri seg aftur.

Hetta var ein ring tíð hjá foreldrunum. Sonurin lá sjúkur langt burtur í California, og Óli sendi læknunum allan sín sparipening fyri at fáa sonin frískan. Tað vísti seg seinni, eftir at Jákup var blivin frískur, at hann átti fitt av peningi í bankanum, men hansara amerikanska kona hevði ikki vilja ofrað pening uppá eina sjúku, sum hon metti at vera vónleysa.

Tá Jákup seinni kom heim á vitjan, fekk pápin allan peningin aftur.

### Sprongdi íbygdan stein

Eitt annað heim, vit komu nógv í, var hjá mostir míni Elsebeth Helenu, sum var gift við Christian M. Christiansen, vanliga kallaður Ludda Kristian. Hann var sína tíð ein av stóru kanónunum í Havn. Tað varð sagt um Ludda, at tað vóru bert Mortensenmenninir á Tvøroyri, sum høvdu fleiri skip undir hond enn hann.

Greitt varð frá honum í røðini Hendur ið Sleptu. Sum hjá so mongum øðrum fór hann á húsagang, hjá honum var tað fleiri ferðir.

Áðrenn hann giftist, hevði Christian bygt sær eini stór hús. Á grundini lá ein steinur, sum var sagdur at vera íbygdur. Christian fekk ávaringar um ikki at spreingja hendan steinin. Tað kundi merkja vanlukku. Men slíkum trúði hann ikki. Men tá ið hann misti alt, minnist eg mammu og onnur siga, at hevði hann ikki sprongt steinin hevði henda ólukkan ikki hend honum.

Umframt tað vinnuliga óhepni fingu tey fýra børn, og trý teirra doyðu sum smá av tuberklum. Konan fekk eisini tuberklar, og alt hetta fekk hesin vanlukku steinur skuldina fyri.



*Ólastova og húsini á lag teknað av Ingálvi av Reyni í Tann Deiliga Havn*

### Tá Mourits Mohr fekk flongjuna

Vit brøður vóru spælikammiratar við synirnar hjá Jens Mohr. Har vóru fýra dreingir og fýra gentur. Mótsett okkum kundi tey gera stórt sæð tað, tey høvdu hug til, sum til dømis at spæla úti sunnudagar.

Hjá okkum skuldi vera friður sunnudagar. Klæðini máttu ikki dálkast, og vit máttu sita friðarlig inni í kirkjutíð, sjálvt um vit ikki vóru í kirkju.

Tann elsti av Mohrbrøðrunum, Mourits, mundi einaferð komið í rættiligar trupulleikar. Hann hevði saman við tveimum javnaldrum tikið lossijaktina hjá abbanum, Jóan P. Evensen. Teir høvdu sett segl, og sigldu út á redina. Men her mundi enda galið. Tað var fitt av vindi av útsynningi, og dreingirnir fingu ikki vent jaktini. Tískil róku teir út í Nólsoyarfjørð, og tað mátti hjálp sendast eftir teimum.

Tá teir eftir nógv stríð komu til lands, møtti gamli Evensen upp, og Mourits fekk eina væl uppiborna fleingju frá abbanum.

Vit plagdu eisini at spæla skúlaskip umborð á lossijaktunum, sum lógu fyri teymi á Eystaru Vág. Mourits var altíð skipari. Sjálvur fekk eg meira beskednar leiklutir sum at vera lættmatrósur. Hetta var tað longsta eg náddi á sjónum, meðan Mourits seinni gjørdist sjómaður.

Ein yngri beiggi var Effe. Hann tosaði ofta um, at hann skuldi blíva prestur, tá hann bleiv stórur. Men hann bleiv hovmeistari. Eina tíð stjórnaði hann einum hospitali í New York. Seinni gjørdist hann hovmeistari á Tjaldrinum.

Ein sonur var Kjartan Mohr, sum var kendur sum skipasmiðjustjóri og tingmaður. Hann var sera sjarmerandi.

Húsið hjá Jens Mohr við Skansavegin varð roknað fyri at vera eitt "yvirklassahús." Jens var jú skipari, og kona hansara Magretha var dóttir ein av stóru keypmonnunum í Havn, Jóan Peter Evensen.